## DAGSINS MEINING

# Skúlamatur eitt frálíkt tiltak

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum hevur sett í verk skipan, ið ger tað møguligt, at kommunurnar kunnu bjóða skúlabørnunum frukt og kølt vatn í skúlunum. Kommunurnar hava tikið sera væl ímóti hesari skipan. Fleiri kommunur eru farnar eitt stig longur og ætla sær at bjóða skúlabørnunum eina heilsugóða máltíð um dagin. Tað hava longu verið røddir frammi um, at hetta er at taka ábyrgd frá foreldrunum. Her eru vit púra ósamd. Vit halda, at hetta við at bjóða eina heilsugóða máltíð er eitt frálíkt tiltak.

Fólkaheilsa er ein tann týdningarmesti spurningurin í okkara tíð. Vit hava júst her í blaðnum endurgivið ávaringar frá útlendskum serfrøðingi í fólkaheilsu, sum ávarar føroyingar. Vit eru á skeivari leið. Vit eta skeivan og lítið heilsugóðan mat, og vit røra okkum ov lítið. Málið um skúlamatin er partur av hesum. Hetta snýr seg ikki um at taka ábyrgd fra foreldrum. Hetta snýr seg um geva børnunum heilsugóðar matvanar frá barnaárunum. Hetta at eta mat, ið ikki er heilsugóður, er við at gerast ein partur av mentan barnanna. Tað er mestsum partur av barna- og ungdómsmentanini at eta junk food. Hesin matur saman við ov lítið av motión er beinleiðis skaðiligur. Hann gevur trupulleikar við heilsuni seinni í lívinum. Hetta við mentanini sæst av, at tað er vorðið upplýst, at nógv børn als ikki eta matpakkan, ið tey hava fingið heimanífrá. Við felags og heilsugóðum máltíðum í skúlanum, ber til at broyta vánaligar matvanar til felags góðar matvanar. Ein eigur eisini at hugsa um, at tað ivaleyst eru foreldur, sum eru so strongd, at tey ikki hava tíð at geva børnunum matpakka hvønn morgun. Við eini skipan við frukt og heilsugóðum skúlamati, kann samfelagið hjálpa foreldrum og børnum til heilsugóðar matvanar, og hetta kemur øllum til góðar seinni. Alt annað er at svíkja børn og foreldur.

Tað er sostatt eitt frálíkt tiltak, ið ávísar kommunur hava gjørt av at fara í holt við. Vónandi fara allar føroyskar kommunur at taka undir við hesum. Hetta er veruliga at taka ábyrgd av framtíðini. Børnini eru sera útsett í dagsins samfelag. Andaliga føðin er harðlig telduspøl, videoharðskapur og eitt ótal av sjónvarpsrásum, ið ikki allar eru eins tespiligar hjá børnum. Tað góða alternativið er gott andaligt tilfar, heilsugóður kostur, rørsla og góð ítróttatilboð og sunn áhugamál. Hetta er ein tann størsta avbjóðingin í dagsins Føroyum. Tað batar lítið at tala um 2015, um tey, sum skulu bera samfelagið framá eftir hetta avgerandi ár, ikki hava líkamligu og sálarligu heilsuna til hesa uppgávu. Vónandi hava bæði landsmyndugleikar og kommunurnar eydnuna við sær við nýggja initiativinum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Millumbylgjusendarin



**Bjarni Djurholm**

Undirritaði hevur latið Løgtinginum anleggslóg m. a. um íløgur í millumbylgjusendistøðina.

Umframt, at uppskotið er partur av arbeiðinum at dagføra úf- og svf-sendinetið, so er hetta eisini í samsvari við umbøn frá Løgtinginum um anleggslóg á økinum. Í bløðunum um dagarnar vóru viðmerkingar um ætlaða millumbylgjusendaran.

Í lógaruppskotinum eru viðvíkjandi nýggjum mb-sendara lýstir nakrir møguleikar fyri sendimegi.

Hesir eru 25, 50, 100 og 200 kW, og greitt er frá hvussu langt støðin hoyrist við nevndu sendimáttum. Talan er í hesum føri um útrokningar við grundarlagi í tølum frá ITU (International Telecomunications Union) og sum eru galdandi fyri útbreiðsluna um dagin, tann sonevnda jørðbylgjan. Um náttina er eisini tann sonevnda rúmbylgjan, sum hoyrist longri enn jørðbylgjan.

Hetta ger, at órógvið frá øðrum sendarum er mest ein trupuleiki um náttina.

Útrokningarnar fyri útbreiðsluna um dagin vísa, at við at broyta sendimegina frá 200 til 25 kW styttist dekningurin frá 800 km til 550 km. Dekningurin fellur sostatt lutfalsliga lítið í mun til fallið í sendimegi.

Hinvegin er alstórur munur á íløgu- og rakstrarkostnaði. Sparingin í íløguni av at keypa ein 25 kW í mun til ein 200 kW sendara er uml. 3,8 mió kr. Árligi rakstrarkostnaðurin til streym fellur frá uml. 1,3 mió. kr til 330 tús. kr fyri 25 kW. Sí annars skema niðanfyri:

| | Verandi sendari | 200 kW | 100 kW | 50 kW | 25 kW |
|---|---|---|---|---|---|
| Íløgukst. mió. kr. umleið* | 1,2 | 5,4 | 4,1 | 2,2 | 1,6 |
| Rakstrarkst. Fyri streym | 1,3** | 2,1 | 1,1 | 0,6 | 0,33 |
| Dekningur km | 800 | 800 | 700 | 600 | 550 |

* Fyrivarni skal takast fyri íløgukostnaðinum av tí at talan er um ikki bindandi tilboð frá veitarum.
** Verandi sendari sendur 90% av tíðini við 100 Kwatt (10% av tíðini við 200 kW). Rakstrarkostnaðurin til streym fyri hinar sendararnar er roknaður við støði í, at sent verður við fullari megi alt døgnið.

Tá metast skal um nýíløgur, mugu øll viðurskifti takast við. Bæði íløgan og rakstur av sendara og eisini hvussu samlaða skipanin verður framyvir, soleiðis, at mest nytta fæst fyri kostnaðin. Sæð úr hesum sjónarhorni er skilagott at gera varligar íløgur í mb-sendaran tá gongdin á økinum er, at størri og størri partur av samskiftinum fer um fylgisvein og internetið.

Viðmerkjast kann, at íslendsku stuttbylgjusendararnir røkka stóran part av Evropa og Norðuramerika. Kostnaðurin er sum skilst sera høgur at reka hesar sendarar. Norska og danska útvarpið hava niðurlagt sínar stuttbylgjutænastur, tí tær vóru ov dýrar at reka og tí mett verður, at tørvurin verður nøktaður við nýggjum samskiftistænastum.

Føroysk fjarskiftisfyritøka veitur í dag internet yvir satelitt til 13-14 føroysk skip. Talan er ikki um fast internetsamband, men skipini kunna móttaka internet og tilber at samskifta frá skipum umvegis internetið, tó at ferðin er avmarkað. Samskifti frá skipum verður mest brúkt at senda teldupost v.m.

Einaferð um samdøgrið móttaka skipini heimasíður við tíðindum, allar føroyskar sendingar frá Sjónvarpi Føroya umframt flestu føroysku tíðindabløðini.

Fyritøkan hevur bjóðað skipum at senda Útvarp Føroya beinleiðis. Higartil hevur áhugin verið avmarkaður. Sambært fyritøkuni er hetta orsakað av kostnaðinum (1.400 kr. um mánaðin).

Vísandi til málslýsingina omanfyri, hevur undirritaði lagt uppskot fyri Løgtingið at keypa 25 kW sendara. Um Løgtingið velur aðra loysn fer tingviðgerðin at avdúka.

# Hvør skonkir í hvønn?



**Fyrireikararnir av Summar Festivalinum**

Í tíðindasendingini hjá Útvarpinum hóskvøldið var eitt innslag um ólógliga skeinking til almenn tiltøk í Føroyum. Aktuell mál hava havt við sær kjak um ólógliga skeinking, og Útvarpið hevur sum ein av týdningarmestu fjølmiðlum í landinum fylgt málinum. Men partur av innslagnum hjá Leif Láadal, tíðindamanni, var villleiðandi og skeivur.

Í innslagnum var millum annað sagt, at »á Summar Festivalinum í Klaksvík var størsta uttandura barr her um okkara leiðir uppstillað« og »vit tosa um útskeinking - og væl at merkja ólógliga útskeinking«.

Vit vilja við hesum gera púra greitt, at tað var eingin almenn ella ólóglig skeinking á Summar Festivalinum 2005. Festivalurin hevði eitt sera gott samstarv við løgregluna og myndugleikar, og tað var ikki selt sterkt á festivalinum. Tí ber útvarpsmaðurin ósannindi um ein festival, sum hevði útvið 8.000 vitjandi í øllum aldri og var eitt framúr væl eydnað og stak friðarligt tiltak.

Summar Festivalurin er ein familjufestivalur, har ung sum gomul, børn sum vaksin skulu kenna seg væl, og tískil er tað ósmakligt at leggja festivalin undir at hava »størstu uttandura barr her um okkara leiðir« og at siga, at »ólóglig skeinking« fór fram á festivalinum er sera óheppið fyri festivalin.

Summar Festivalurin tekur flest hugsandi atlit til trygd og trivnað á festivalinum og í lokalsamfelagnum, og tískil vilja vit als ikki góðtaka, at festivalurin verður lagdur undir at fremja lógarbrot.

Vit halda tí at tað er rímiligt, at skeivu tíðindi beinanvegin verða rættað, og at Summar Festivalurin fær eina umbering.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.